ítróttur

Nr. 212 • hósdagur • 7. november 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

VÍF-Kyndil 28-29 (13-15):

Ordiligt brak

Dysturin í Vestmanna mikukvøldið var av slagnum, sum liva leingi í minninum hjá kræsna hondbólts-áskoðaranum

Talan var alla tíðina um sera tætta uppgerð, har hvørgin parturin vildi vika seg ein tumma í nærdystunum
Mynd: Álvur Haraldsen

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

At nógv kann henda innan stutta tíð í hondbólti var mansdysturin í Vestmanna mikudagin gott dømi um. Seinastu 30 sekundini ella so mundi øll høllin vera á gosi. Liðini bæði megnaðu hesa stuttu tíðina at tveita bóltin burtur eina ferð í part. VÍF megnaði at brenna dupultmøguleika at vinna dystin og Finnur Hansson fekk við seinasta skotinum í dystinum skotið avgerandi málið.

Rápa fyri Olsen

Undan hesum høvdu teir gott 400 áskoðaranrir í høllini verið vitni til ein teimum dystunum millum arvafiggindarnar, sum sanniliga livdi upp til heitið sum klassikarin í føroyskum hondbólti. Ein dyst, har báðir partar stríddust av øllum alvi fyri sigrinum. Har Kyndil kanska vóru teir, sum høvdu munin stóran part av tíðini, men har vestmenningarnir tó ongan tíð góvu seg yvir, men tvørturímóti fleiri ferðir hóttu við at senda gestirnar heim við ongum.

Fyrstu løtuna var annars lítt til, at nú skuldi VÍF reisa seg úr øskuni. Ferðin varð frá fyrsta bríksli sett høgt upp, men so líðandi kom Kyndil eisini við í dystinum. Framúr stríðsviljin hevur eyðkent teir grønu seinasta knappa árið ella so, og skjótt stóð greitt, at ansaðu vestmenningarnir sær ikki, so kundi talan gerast um greitt tap. Ta einu løtuna tóktist nærum vera fullkomuliga líkamikið, hvaðandi Kyndilsleikararnir komu, men eftir at Daniel Rápa kom á vøllin, fekk VÍF aftur betur tak á. Bæði í verjupartinum og ikki minst í álopspartinum. Har hevur Daniel ofta verið tann, sum hevur fört kreativitin í álopsspælið, men hesaferð sýndi hann seg eisini sum málskjútti, og við einum VÍF liði uttan Olsen beiggjarnar, vóru báðir lutir harðliga tiltrongdir.

Sjónlig møði

Kyndil fekk tó aftur skrykt seg avstað beint undan steðginum, og í løtunum eftir steðgin gjørdist hendan gongdin meira sjónlig. Liðið vann seg eitt skifti fýra mál framum, men so fór møðin av álvara at merkjast. Breiddin í leikarahópinum hevur áður verið nevnd sum størsti – og kanska einasti – veikleikin á liðnum, og sum minuttirnir gingu át VÍF seg bara nærri og nærri sigrinum. Piti og Sámal høvdu nú eisini innstillað kanónirnar, og upp á fimm minuttir hevði VÍF soleiðis koppað øllum á.

Eitt time-out tóktist tó vera bjargingin hjá Kyndli. Hetta gav liðnum luftina aftur, og seinastu fimm minuttirnar mundun hitastigini í høllini fara fleiri stig upp. Liðini skiftust um at skora, tá VÍF so kiksaði við støðuni 28-28, tóktist alt liggja til Kyndil. Fyrsta álopsroyndin kiksaði tó, men tá Dejan Lacok - sum í seinna hálvleiki stóð sum sannur brandur - í eini heilabløðing sendi bóltin beint í føvningin á Kyndilsleikara, tóktist slagið vera tapt. Í hvussu so er í eini fimm sekund.

Tí Dejan var nevnliga ikki einasti apoplexi-sjúklingurin hesa løtuna. Hóast 27 sekund vóru eftir, so smekkaði Finnur Hansson til alt fyri eitt, og tá bólturin streyk framvið málinum, tók VÍF sítt time-out. Hetta gav teimum góðar stundir at umhugsa seinasta álopið, og tað átti eisni at givið úrslit, tá teir fimm sekund fyri leiklok leiktu Agnar Joensen, kundi tað veri avgerðin. Men Johan Danielsen bjargaði, og tá Piti so sendi returin á stongina úr spískum, fekk Kyndil seinasta møguleikan. Og hesaferð sveikt Finnur ikki.

Eingin kreppa - men

Undan dystinum hevur verið tosað um kreppu í VÍF, og tó at talan aftur gjørdist um tap, so bendi innsatsturin á vøllinum hesaferð á, at liðið er ávegis úr kreppuni. Men tað skerst ikki burtur, at leikararnir mundu iðra seg um dystin aftaná. Høvdu teir bara koyrt bóltin runt seinastu løtuna, so vildi tað í løtuni merkt tað sama, sum ein sigur hevði gjørt. VÍF hevur nevnliga enn ongan javnleik á kontini mótvegis Kyndli, sum vildi mist stig við javnleiki, so í so máta má sigast, at talan var um eitt illa umhugsað seinasta álop.

Hjá Kyndli mundi tað hinvegin kennast sum at fáa jackpot í lottarínum. Liðið helt fast um góðu byrjanina á árinum, og kanska týdningarmiklari, so fingu teir opna eitt veruligt hol niður til arvafiggindarnar. Enntá í egnari holu.

Dysturin í tølum

VÍF-Kyndil 28-29 (13-25)
Málskjúttar
VÍF: Sámal Joensen 7(1), Daniel Rápa 7, Piti Negru 5, Harald Bjørgvin 2, John Zachariasen 2, Petur Frank Joensen 2, Ólavur Brimnes 2, Áki G. Olsen 1
Kyndil: Hans Áki Dal-Christiansen 8(4), Høgni Klein 6, Jacob Jónsson 5, Josef Abrahamsen 3, Janus Einar Sørensen 3(1), Finnur Hansson 3, Ken Zachariasen 1
Brotskøst: VÍF 1, Kyndil 7
Útvísingar: VÍF 6, Kyndil 4
Dómarar úr Tjaldri: Trygvi Mortensen & Kári Hansen. Ikki alla tíðina líka sannførandi, men fyri úrslitið av dystinum hevði ikki avgerandi týdning.

Kjansir mugu takast

Fegnasti maðurin í høllini eftir dystin mikukvøldið var uttan iva Finnur Hansson hjá Kyndli. Eitt var, at hann við seinasta skotinum tryggjaði teimum grønu sigurin, men talan kundi eins væl verið um leiklutin sum stóri skurkurin eftir stóra avbrennarin 25 sekund frammanundan.

– Hatta er hondbóltur. Tú ert noyddur at taka kjansir, men eg má viðganga, at eg ikki hevði tað nakað serligt, tá eg brendi handan møguleikan. Men har var bara eitt at gera. Fáa fatur á bóltinum og skora. Alternativið var at verða hálshøgdur, segði hann hálvgum tivandi og hálvgum smílandi eftir dystin.

Sigurin tryggjaði annars Kyndli, at framúr góða byrjanin enn stendur við, og tá vit spurdu Finnur um orsøkina til hesa, tóktist hann vera púra ivaleysur.

– Vit kenna hvønn annan nógv betri nú. Í fjør var talan í nógvum førum um sjey leikarar, sum fóru á vøllin. Í ár eru vit eitt lið, har allir taka tøk í felag, og tað gevur úrslit, helt leikarin, sum mundi blivið skurkurin men sum endaði við at gerast stóra hetjan í Kyndils-leguni mikukvøldið.

-jm

VÍF-Kyndil 31-16 (17-5):

Eftir ætlan

Eingin slingur var í valsinum, tá VÍF-kvinnurnar mikukvøldið tóku ímóti Kyndli

Líkt er til, at Irina Radovici kann gerast góður fongur hjá VÍF hetta kappingarárið
Mynd: Álvur Haraldsen

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

At stórur munur er á toppi og botni í føroyskum kvinnuhondbólti varð enn einaferð staðfest, tá Kyndil vitjaði í Vestmanna mikukvøldið. Undan dystinum varð mest sum roknað við, at talan var um avgreiðsluspurning fyri VÍF, og hetta var eisini ein spádómur, sum skuldi vísa seg at halda.

Við at halda so nøkunlunda fast í verjuni, fyri síðani at revsa náðisleyst við kvikum kontraálopum hevði heimaliðið fyrstu 25 minuttirnar vunnið seg upp á 14-2, og so kundu tær gulu loyva sær at taka tað meira róligt restina av dystinum.

Seinasti hálvi tímin var eisini í stóran mun nýttur til at geva yngru leikarunum í hópinum nakað av dystarvenjing, og sjálvt um hetta merkti, at Kyndil kom betri við í dystinum, so er ikki heilt av leið at staðfesta, at eisini við hesi B-ketuni, var VÍF betra liðið.

Tað kann kanska vera ringt at taka nakran framum, tá munurin millum liðini er somikið stórur, men greið tekin eru longu nú um, at tær báðar nýggju útlendsku kunnu gerast sannur fongur hjá VÍF. Í øllum førum munnu útkøstini frá Adelu Burcea standa lítið aftan fyri tey, sum Manuela Stan hevur vant vestmenningar við, og á strikuni er einki at ivast í,at Irina Racovici fer at gera nógv um seg komandi tíðina.

Hjá Kyndli er neyvan annað at gera, enn at halda høvdið høgt. Í Vestmanna høvdu tær ongan møguleika, men hesin eigur at vera til staðar, tá tær komandi mikudag vitja á Giljanesi í einum av teimum fýra dystunum, sum í ár tykjast avgerandi fyri niðurflytingarstríðið.

Dysturin í tølum

VÍF-Kyndil 31-16 (17-5)
Málskjúttar
VÍF: Irina Radovici 10, Nikolina Eyðbjørnsdóttir 8, Sóley Mikkelsen 5(1), Ioana Rápa 4(2), Finngerð Joensen 2, Fríða Marjunardóttir 1, Eydna Petersen 1
Kyndil: Randi Wardum 5(1), Linda Weihe 4, Ann Mari Wang 3, Fía Selma Nielsen 2, Súsanna Petersen 1(1), Hildur Mikkelsen 1
Brotskøst: VÍF 3, Kyndil 2
Útvísingar: VÍF 3, Kyndil 2
Dómarar úr Tjaldri: Trygvi Mortensen & Kári Hansen. Tóku tað bara heilt róligt.

Hondbóltsstøður

1. Deild kvinnur

	dystir	v	-	j	-	t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1 VÍF	6	5	-	0	-	1	154	127	27	10
2 VB	5	4	-	0	-	1	126	89	37	8
3 Stjørnan	4	2	-	1	-	1	97	78	19	5
4 StÍF	4	2	-	1	-	1	96	94	2	5
5 Neistin	4	2	-	0	-	2	111	88	23	4
6 Søljan	4	0	-	0	-	4	69	104	-35	0
7 Kyndil	5	0	-	0	-	5	68	141	-73	0

1. Deild menn

	dystir	v	-	j	-	t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1 Kyndil	4	3	-	1	-	0	116	109	7	7
2 Neistin	3	2	-	1	-	0	88	76	12	5
3 StÍF	3	2	-	0	-	1	73	67	6	4
4 VÍF	4	1	-	0	-	3	101	100	1	2
5 KÍF	3	1	-	0	-	2	75	81	-6	2
6 H71	3	0	-	0	-	3	72	92	-20	0